| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 23. mei 2007 |
| Býráðsfundur nr. (eykabýráðsfundur) | 06/2007 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2007 tann 23. mei kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 16. mei 2007 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Elisabeth D. Eldevig
Signar á Brúnni
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Petur Abrahamsen

Jón Nolsøe Olsen møtti ikki á fundinum og hevði ikki givið borgarstjóranum fráboðan um hetta. Sambært telefonsamrøðu millum býráðsskrivaran og Gunnleyg Olsen konuna hjá Jóni kl. 16.35 varð upplýst, at maðurin varð á veg í flogfarinum til fiskarímessu í Glasgow í Skotlandi.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 33/2007.**

***Uppsøgn av verandi býráðssamstarvi, skipan av valbólki og val av teimum 5 føstu nevndunum av nýggjum.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skrivliga fráboðan, dagfest 16. mei 2007 frá 5 býráðslimum um valbólk restina av valskeiðnum 01. januar 2005-31. desember 2008, sum er soljóðandi:

Undirritaðu býráðslimir, sum valdir eru á kommunuvalinum tann 09. november 2004 fyri valskeiðið 01. januar 2005 til 31. desember 2008 umboðandi lista A, part av lista B og lista K, loyva okkum hervið at boða borgarstjóranum/býráðnum frá, at vit við hesum vilja siga breiða samstarvið í býráðnum frá 30. november 2004, broytt tann 26. januar 2006 upp beinanvegin, við áheitan um, at føstu nevndir býráðsins verða valdar og skipaðar av nýggjum.

Vit umboða fleirtalið í býráðnum við 5 limum, og vilja vit sambært Kapittul 1, § 3, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við seinni broytingum boða borgarstjóranum frá, at vit eru gingin saman í valbólk og vilja atkvøða saman í sambandi við vali av limum í allar trímannanevndirnar.

*Sambært avtalu í valbólkinum verður skotið upp at velja niðanfyri standandi limir í nevndirnar, og sjálvt um nevndirnar skipa seg sjálvar sambært kommunustýrisskipanini, so er avtala gjørd í meirilutavalbólkinum, hvørjir býráðslimir skulu verða nevndarformenn valskeiðið út.*

| *Limur:* | *Fíggjarnevndin:* | *Tekniska nevndin:* | *Mentamálanevndin:* | *Havnanevndin:* | *Sosiala nevndin:* |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Sigurð S. Simonsen | Dánjal Vang | Elisabeth D. Eldevig | Dánjal Vang | Eyðun á Lakjuni |
| 2 | Elisabeth D. Eldevig | Eyðun á Lakjuni | Jann Toftegaard | Eyðun á Lakjuni | Elisabeth D. Eldevig |
| | | | | | |
| Formaður: | Borgarstj. Formaður | Dánjal Vang | Elisabeth D. Eldevig | Dánjal Vang | Eyðun á Lakjuni |

Talan er um hesar býráðslimir vegna "Lista A": Dánjal Vang, Jann Toftegaard og Eyðun á Lakjuni, vegna part av "Lista B": Sigurð S. Simonsen og vegnma lista "K": Elisabeth D. Eldevig.

Minnilutin við 3 limum umboðandi Lista "E": Signar á Brúnni og Tórfríður Abrahamsen og lista "C": Petur Abrahamsen boðaðu á býráðsfundinum frá, at teir ikki gingu saman í valbólk og tessvegna ikki ynsktu at verða valdir sum limir í føstu nevndirnar.

**Niðurstøða:**
Samtykt varð at taka undir við uppskotinum frá meirilutavalbólkinum um val av teirra limum í føstu nevndirnar restina av verandi valskeiði, t.v.s. frá 23. mei 2007 til 30. desember 2008. (5 atkv. fyri og 3 akv. Ímóti).

Signar á Brúnni ynskti at fáa valið av limunum hjá minnilutanum í nevndirnar útsett, til hann hevði fingið eitt løgfrøðisligt úttalilsi í málinum. Henda áheitan varð ikki gingin á møti av meirilutanum.

Fyri at fáa manna føstu nevndirnar varð skotið upp av meirilutavalbólkinum at veja hsar limir aftrat í føstu nevndirnar:

| | |
|---|---|
| Fíggjarnevndina: | Eyðun á Lakjuni |
| Teknisku nevndina: | Elisabeth D. Eldevig |
| Havnanevndina: | Jann Toftegaard |
| Mentamálanevndina: | Dánjal Vang |
| Sosialu nevndina: | Dánjal Vang |

Uppskotið um val av omanfyri standandi limum í føstu nevndirnar restina av verandi valskeiði, t.v.s. frá 23. mei 2007 til 31. desember 2009 varð samtykt. (5 atkv. fyri og atkv. 3 ímóti).

Sostatt er avtalan, sum gjørd varð á býráðsfundi 26. januar 2006 um umskipan av føstu nevndunum farin úr gildi við nýggju samtyktini.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.20.

Jann Toftegaard

Dánjal vang

Elisabeth D. Eldevig

Signar á Brúnni

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Tórfríður Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen